Nýggjársrøða løgmans



Góðu landsmenn!

Á midnátt er aftur eitt ár farið í tíðarinnar hav.

Gamlaárskvøld steðga vit á gøtuni frá tí farandi til tað komandi árið. Vit nýta høvi at líta aftur um bak, eins og vit líta fram í tað komandi árið og bera hvør øðrum góð ynski um framtíðina.

Fyrst vil eg siga, at tað er hugaligt í ár hjá løgmanni at bera fram nýggjárskvøðu til allar landsmenn, tí tað er týðiligt, at stór framstig eru hend. Tann framgongd, sum sást í farna ári, tók dik á seg í hesum árinum:

Búskapargongdin

Landsstýrið setti sær fyri at fáa javnvág á fíggjarløgina í seinasta lagi í 1998. Men frý at áðrenn ætlað hava vit røkkið hesum máli.

Longu í fjør eydnaðist at fáa javnvág á fíggjarløgina, og í ólavsøkurøðuni segði eg, at framgongdin merktist á næstan øllum økjum í samfelagnum, og at vit í ár aftur fóru at nærkast javnvágini.

Nú við árslok kunnu vit staðfesta, at úrslitið gjørdist betri enn mett á ólavsøku. Sambært nýggjastu hagtølunum verður ikki bara javnvág, men eitt lítið avlop á fíggjarløgini.

At fíggjarløgir javnvíga og harafturat hava eitt veruligt avlop, hevur ikki verið málið her á landi í mong ár.

Fyri júst 5 árum síðani vórðu nakrir fólkstørmenn spurdir, hvussu árið 1992 fór at hilnast. Sum tann mest varni metti eg tá, at 1992 fór at gerast munandi verri enn 1991.

Samfelagsskrædlið gjørdist nógv álvarsligari og meiri umfatandi enn mett við árslok 1991. Kreppan stakk sera djúpt, og alt ov long tíð gekk, til vit fingu fótafestið aftur.

Í 1994 fóru vit undir at venda fíggjarligu gongdini í Føroyum. Politiski setningurin steðgaði afturgongdini, tí longu í 1995 fingu vit vent búskaparligu gongdini munandi tann rætta vegin.

Nú gongur av álvara frama

Tølini fyri 1996 undirstrika so týðuliga, at nú gongur av álvara frama.

Góð úrslit fyri farna árið gera tað lættari at meta um tað komandi árið.

Sum dømi kunnu nevnast:

- Arbeiðsloysið, sum fyrst í 1994 var eini 25% og við árslok 1995 var eini 14%, er nú komið niður á 10%.

- Talið á løntakarastørvum er økt uml. 1.500 í hesum árinum.

  Lønarútgjaldingarnar í ár verða eini 7-8% hægri enn í fjør.

Vøkstur sæst í øllum vinnugreinum uttan fígging. Munandi vøksturin stavar serliga frá fiskiskapi, fiskavøruídnaði, aling, ýmiskari framleiðslu, handli, umvælingum og sjóflutningi.

Fólkatalið veksur nú aftur. Í ár gjørdust við uml. 300 fólk fleiri, ella á leið burðaravlopið. Tilflyting og fráflyting eru á jøvn, góð 1800 fólk hvønn vegin.

Búskaparligi batin gevur møguleika fyri at lætta um byrðarnar hjá fólkinum. Stórur skattalætti varð givin í ár, góðar 100 mió.kr. tilsamans, og aftur komandi ár verða givnar 55 mió.kr. í skattalætta. Harafturat er fíggjarognaravgjaldið, sum upprunaliga var 127 mió.kr., endaliga avtikið á nýggjárinum.

Útflutningurin tríggjar teir fyrstu ársfjórðingarnar vaks uml. 15% í virði.

Ein orsøkin er økti fiskiskapurin av toski og hýsu, sum í stóran mun er komin samfelagnum til góðar, bæði vegna størru nøgdina, og av tí at stórur partur av hesum fiski er landaður í Føroyum. Hetta sæst aftur í løntakaratølunum og lønarútgjaldingunum.

Innflutningurin tríggjar teir fyrstu ársfjórðingarnar vaks góð 15% ella umleið 200 mió.kr. Av innflutninginum eru einar 50 mió.kr. fóður, 25 mió.kr. byggitilfar, 50 mió.kr. tilfar til ýmsar vinnur, 30 mió.kr. brenniervni, 30 mió.kr. bilar, og 40 mió.kr. nýtsluvørur. Tað positiva í hesum er, at meginparturin av innflutninginum er tilfar o.a. til vinnuna, og ein minni partur er farin til nýtslu.

Nettouttanlandsskuldin minkar alsamt. Við árslok í 1995 var nettouttanlandsskuldin umleið 4,3 mia. kr. Hetta er umleið helvtin av tí, hon var í 1990, tá hon var 8,5 mia.kr.

Gjaldsjavnaavlopið fyri 1995 er uppgjørt til góðar 800 mió.kr., og gjaldsjavnaavlopið farna árið verður helst størri. Fyri at lýsa fíggjarstøðuna plagdu teir gomlu at spyrja, hvussu nógvar krónur vóru í kassanum við árslok. Svarið er, at gjaldførið landskassans hevur verið betri enn nakrantíð meginpartin av árinum, umleið 1 milliard kr. í tøkum peningi. Í staðin fyri at endurfíggja lánsbrøv valdi landsstýrið at gjalda tær umleið 300 mió.kr. aftur kontant við peningi av kistubotninum.

Framgongd í flestu vinnugreinum

Alivinnan hevur vunnið á stóru trupulleikunum. Framleiðslukostnaðurin er lækkaður og kappingarførið batnað. Ferðavinnan hevur samskipað seg betur og gjørt stór framstig. Annar ídnaður er eisini farin undir miðvíst samstarv, og tað er neyðugt skulu vit klára okkum á einum fríum altjóða marknaði. Hetta eru vinnugreinir í menning, sum geva samfelagnum inntøkur og onnur arbeiðspláss, so ikki bara verður duvað uppá fiskivinnuna.

Góði toskafiskiskapurin kom fiskivinnuni og samfelagnum sum heild væl við. Partar av flotanum og virki á landi hava fingið nógv burtur úr sildini, sum nú er komin aftur í okkara sjógvi. Útlitini eru betri, nú kvotan gjørdist umleið 15.000 t størri enn í fjør. Landsstýrið fer at leggja herðslu á at fáa so nógv sum gjørligt burtur úr hesum tilfeingi.

Neyðugt at vera varin

Samanumtikið hevur gingið nógv betur enn væntað, og vit hava alla grund til at fegnast. Vit hava megnað at vent afturgongd til framgongd. Men vit hava havt viðrák, rentan á altjóða marknaðinum hevur verið lág, og botnfiskastovnarnir og sildastovnurin eru komnir skjótari fyri seg enn væntað. Tí er sera neyðugt at vera varin í viðrákinum og duga sær hógv.

Hóast hesa framgongd kunnu vit ikki verða nøgd, fyrr enn arbeiði er til øll, og teir landsmenn, sum eru farnir av landinum fyri vinnuloysi, hava møguleika at koma heimaftur. Vegurin fram er at gera vinnulívið kappingarførari, og at útvega fleiri arbeiðspláss í nýggjum vinnum.

Vert er at minna á, at enn hava vit ikki endaliga loyst fíggjarligu trupulleikarnar. Langt er eftir á mál. Uttanlandsskuldin er sera stór. Vit skulu í komandi ári staðfesta, hvussu stórur partur av henni er okkara og avtala við danir um at gjalda tann partin av skuldini aftur.

Landsstýrið hevur gjørt sítt til at útvega sparingar á fíggjarløgini fyri støðugt at lætta um byrðarnar hjá fólki og at gjalda okkara part av uttanlandsskuldini aftur. Men undir fíggjarnevndarviðgerðini varð lorað út annað ár á rað. Eg eri samdur við landsstýrismannin í fíggjarmálum, at fíggjarnevndin eigur ikki at viðgera fíggjarløgina sum sítt egna sjálvtøkuborð.

Vantandi lønsemi

Hóast týðulig tekin um betri búskapargongd, er talan um fleiri ivamál, tá ið ein skal meta um komandi árið.

Fiskavøruframleiðslan á landi gongur illa. Hóast stórar nýggjar upphæddir nú eru tøkar hjá størsta framtakinum, einar 100 til 150 mió.kr., harav meira enn 50 mió.kr. til at nútímansgera virki og harvið nógv arbeiði til handverkarar, so verður neyðugt gjølla at umhugsa, hvussu framleiðsluviðurskiftini og effektiviteturin skulu betrast.

Vit mugu seta okkum spurningin, um vit kunnu bera somu toskaveiði í 1997, ella vit ovfiska toskastovnin, sum nógvir føroyingar halda vandi er fyri. Heili 37.000 t eru veidd av toski í ár móti eini 20.000 t í fjør.

Fiskiflotin hevur trupult við at fáa endarnar at røkka

saman, og hvussu verður tá flogustuðulin fellur burtur !

Altjóða marknaðar-viðurskifti

Fyri at fóta okkum á altjóða marknaðum er sera umráðandi at hava góð marknaðarviðurskifti, serliga á evropeiska marknaðinum, har vit selja umleið 80% av okkara fiskavørum. Handilssáttmálin við ES er nú dagførdur, eftir at Svøriki, Finnland og Eysturríki gjørdust limir í ES. Men sáttmálin er framvegis ikki nøktandi, hóast dagføringin kann sigast at verða eitt framstig.

Fyri at menna útflutningin av uppisjóar fiskasløgum og fáa størri samhandil í heila tikið, verður komandi ár farið undir at gera handilssáttmálar við Eysturevropeisku londini.

Løgmaður gjørdi á fundi við ES herfyri greitt, at Føroyar sum partur av danska ríkinum eiga ikki at verða samanborin við vanlig triðjalond. Eins og onnur lond, ið eru atlond hjá ES-londum, hava Føroyar fullan rætt til sersømdir.

Oljuvinna og marknasamráðingar

Føroyingar seta stórar vónir til eina komandi oljuvinnu. Men vit eiga at gera okkum greitt, at henda vinna verður tíðaravmarkað.

Áhugin hjá oljufeløgum fyri føroyskum økiyvirhøvur er vaksin seinasta árið, og boringin í Lopra er eitt talandi dømi um hetta. Tilmælisumfarið gav ábendingar um, at oljufeløgini hava áhuga fyri økinum fram við Hetlands-rennuni og størri økjum aðrastaðni á landgrunninum.

Í samráðingunum um landgrunsmarkið millum Føroya og Bretlands gongur striltið. Enn er langt millum partarnar, men bæði londini eru tó framvegis sinnað at finna eina samráðingarloysn. Um tær fara at eydnast, fer helst at vísa seg tíðliga í 1997.

Nýggj samgonga

Í farna ári fóru politiskar broytingar fram. Sum kunnugt var nýggj samgonga skipað í juni mánaði, tá Javnaðarflokkurin av óvissum grundum tók seg úr samgonguni og Fólkaflokkurin kom uppí.

Fremsta endamál hjá hesi samgongu er at tryggja ta framgongd, ið lunnar vóru lagdir undir eftir síðsta løgtingsval, og sum nú er komin væl áleiðis.

Skipanin við ráðharraábyrgd ber í sær, at hvør landsstýrismaður sær hevur rættarliga og politiska ábyrgd av sínum málsøkjum. Arbeiðið at broyta almennu umsitingina heldur fram, so umsitingin kann gerast búgvin til broyttu krøvini. Fíggjarmálastýrið verður sum tað fyrsta skipað í komandi ári.

Stórmál til viðgerðar

Fleiri stórmál koma til viðgerðar og týdningarmiklar avgerðir skulu takast, sum uttan iva fáa avleiðingar fyri føroyska samfelagið langt inn í næstu øld.

Frágreiðingin frá oljuráðleggingarnevndini verður eftir ætlan latin landsstýrinum í vár, og uppskot til kolvetnislóg verður síðani lagt fyri tingið.

Gongur sum ætlað, verða fyrstu økini bjóðað út til leitingar síðst á árinum.

Bankakanningin verður væntandi liðug í komandi ári. Tá verða samráðingarnar við danir tiknar uppaftur um tann partin av uttanlandsskuldini, sum fevnir um bankaskuldina og afturgjald av okkara parti av skuldini.

Nevnd verður sett at gera uppskot til meginreglur um, hvussu blokkstuðulin skal ásetast aftaná 1998. Arbeiðið hjá nevndini skal verða liðugt komandi ár.

Broytingartíð

Stórar og umfatandi broytingar fara fram her heima og úti í heimi. Lond og samgongur, sum fyrr stóðu langt frá hvør øðrum, tosa nú um samstarv, menning, trygd og frið. Eystureuropeisku londini eru sinnað at vera við í samstarvinum í Europa, og Norðurlond og baltisku londini vilja knýta tættari samband. Landamørk og tjóðskapur hava ikki longur sama týdning í altjóða samstarvinum. Peningur, arbeiðsmegi og virksemið savnast har, ið mest fæst burturúr.

Tøkniliga menningin gongur skjótt. Støðugt nýggir tøkniligir møguleikar stinga seg upp, og støðan broytist alsamt. Altjóða teldunet dregur okkum nærri umheiminum. Alt hetta ávirkar okkum og broytir okkara hugburð og setur krøv til samfelagið at laga seg til broyttu umstøðurnar. Neyðugt er tí at fylgja við í altjóða samstarvi og altjóða marknaðum, sum gerast alt fríari og fríari.

Føroyar eru eitt samfelag í broyting. Tá Føroyar síðst í farnu øld fóru frá bóndasamfelagnum til fiskivinnusamfelagið, var talan um eina kollveltandi samfelagsbroyting. Broytingin, ið tá fór fram, er grundarlagið undir okkara vælferðarsamfelagi í dag. Gongst sum vónað, verða Føroyar við í eini olju vinnu, og umfatandi broytingar fara fram fyrst í næstu øld. Hesar seta stór krøv til samfelagið, og neyðugt er tí at fyrireika seg væl til stóru avbjóðingarnar.

Stórvitjanir

Í hesi broytingartíð vilja vit fegin vísa fram okkara vakra land. Vit kunnu fegnast um, at vit fáa stórvitjanir til landið í komandi ári - vitjanir, sum seta Føroyar í miðdepilin.

Løgmaður hevur júst boðið Noregs kongi Haraldi V og Sonju drotning á vitjan í Føroyum. Hetta verður á fyrsta sinni, at norsk kongshjún eru gestir okkara.

Margreta drotning og Henrik prinsur vitja ríkispartarnar í samband við, at Margreta drotning hevur sitið 25 ár á trúnuni. Almenna vitjanin verður í summar.

Á vitjan løgmans í Íslandi í summar vórðu íslendski forsætisráðharrin Dávið Oddsson og frú Ástríður Thorarensen boðin á almenna vitjan í Føroyum. Tey verða almennu gestir okkara í vár.

Grønlendski landsstýrisformaðurin Lars Emil Johansen og frú Ivalo Egede eru boðin á almenna vitjan í Føroyum í komandi ári.

Vit gleða okkum til hesar stórvitjanir. At ríkisleiðarar og stjórnarleiðarar í grannalondum okkara vitja higar hevjar virðingina fyri landi og fólki.

Haraftrat fer filmurin um Barbaru, sum verður frumsýndur í komandi ári, at geva nógva umtalu og gera Føroyar kendar víða um heim.

Góðu føroyingar

Eg vil enda við at siga, at vit hava nú fótað okkum aftur, og ringasti stormurin er avhasaður.

Vegna Føroya landsstýri fari eg at bera Føroya fólki eina hjartans tøkk fyri virkislýsni og ágrýtni hesi trupulu árini. Allir føroyingar hava verið við til at borið byrðarnar, og í felag hava vit vent afturgongd til stóra framgongd. Framvegis er neyðugt at stríðast fyri at koma uppá turt, og tað fara vit at megna í felag.

Ymist er hvussu árið hevur roynst hjá tí einstaka. Hjá summum hevur árið verið merkt av gleði, og vit gleðast við teimum. Onnur vóru fyri missi, og okkara tankar leita til teirra. Í djúpari samkenslu biðja vit Harran styrkja tykkum at vinna á sorgini.

Við ynski um framburð fyri Føroya fólk og Føroya land fari eg vegna landsstýrið at ynskja øllum landsmonnum, burturi sum heima, eitt gott nýggjár og Harrans signing í komandi ári.

– Løgmaður skuldi heldur takka Gudi...

– Heldur enn sjálvur at tikið sær heiðurin, átti løgmaður at takka Gudi fyri, at fiskur er komin aftur á grunnarnar. Tað er tað sum hevur týdning, heldur Jenis av Rana úr Miðflokkinum

EIRIKUR LINDENSKOV

– Nei, eg trúgvi ikki løgmanni... Tøl eru positiv, men eg fari at endurtaka tað, sum eg segði undir løgmansrøðuni. Tað er bara eitt tal, sum er positivt, og tað er tann økta veiðan.

Hetta sigur Jenis av Rana løgtingsmaður fyri Miðflokkin í stuttari viðmerking til nýggjársrøðu løgmans.

Jenis av Rana hevur eisini lagt til merkis, at løgmaður altíð melur um orðini »Vit hava vent afturgongdini til framgongd...«

Men so er ikki. At meiri fiskur er komin á grunnarnar kann løgmaður ikki taka sær heiðurin av, tí tað er ikki hann, sum hevur givið okkum fiskin. Heldur skuldi løgmaður takka Gudi fyri fiskin, sigur Jenis av Rana. – Tí tað er tað, sum hevur týdning...

– Tá formaðurin í ráðgevandi nevndini var á fundi við fíggjarnevndini segði hann tað sama, sigur Jenis av Rana. – Vit kunnu ikki grunda ein búskaparvøksturin á øktan fiskiskap, tí tað er ov ótrygt. Heldur átti landsstýrið at gjørt nakað munagott.

Jenis av Rana heldur, at tað er ein spurningur, um tað ikki er talan um ránsveiðu í fiskiskapinum í dag, og tað heldur hann vera eitt alt ov veikt grundarlag at byggja búskaparligu framgongdina á.

Men hann heldur, at tað var ein løtt røða, sum løgmaður hevði.

– Hann nevndi einki um grundleggjandi trupulleikar, sum eitt nú kommunuskuldina, sum liggur sum ein tikkandi bumba undir øllum kommununum. Kommunuloysnin er eingin loysn sum so, hon hevur bara útsett pínuna, sigur Jenis av Rana.

– Løgmaður tosaði eisini um, at allir føroyingar hava borið byrðar. Men tað passar ikki. Nakrir føroyingar hava borið byrðar. Skattalættin í fjør favoriseraði tey ríku.

Jenis av Rana harmast eisini, at løgmaður legði eftir fíggjarnevndini, tí hon hevði lorað.

– Hann skuldi heldur verið glaður fyri, at vit gjørdu nakrar sostalar á bøtur, sigur Jenis av Rana at enda.